Fiskimálaráðið

Dagfesting: 22.04.2021

Kunning um hvørjar nøgdirnar eru til vinnuligar royndir og verkætlanir í 2021

Sambært áheitan frá Bjørt Samuelsen, forkvinnu í Løgtingsins vinnunevnd, frá 8. apríl 2021, eftir nevndarfund sama dag í løgtingsmáli 100/2020, er niðanfyri tilskilað, hvørjar nøgdirnar av makreli, norðhavssild og svartkjafti eru í 2021, ið skulu lutast út til vinnuligar royndir og verkætlanir í 2021:

Sjófeingislógin	**Makrelur**[1]	**Norðhavssild**	**Svartkjaftur**[2]
§ 14, stk. 1[3]	9.129 tons	12.202 tons	28.063 tons
§ 14 a, stk. 2 (flyting frá 2020 til 2021)	2.295 tons	2.152 tons	3.360 tons
§ 15[4]	4.921 tons	14.952 tons	28.874 tons
§ 15 b[5] (flyting frá 2020 til 2021)	4.260 tons	8.095 tons	Ikki umfataður
§ 15 c (flyting frá 2020 til 2021)	1.855 tons	Ikki umfatað	Ikki umfataður
§ 15 d (flyting frá 2020 til 2021)	2.840 tons	Ikki umfatað	Ikki umfataður

Kelda: Vørn og ávísu kunngerðirnar fyri nevndu fiskasløgini

Víst verður annars til nevndarskjal frá Fiskimálaráðnum í løgtingsmáli 100/2020, dagf. 9. apríl 2021, har kunnað varð um, hvussu nøgdirnar sambært §§ 14-17 í sjófeingislógini verða settar av til vinnuligar royndir og verkætlanir, haruppií flytingar millum ár.

Fiskimálaráðið, 22. apríl 2021

Andras Kristiansen
Deildarstjóri

/ Torkil V. Rasmussen

---

[1] Fyrivarni verður tikið fyri, at eingin makrelkunngerð er lýst enn, og tí verður einki fiskiloyvi útskrivað. Tølini fyri makrel, ið eru grundað á tøku føroysku kvotuna áðrenn býti við onnur lond sambært § 14, stk. 1 eru fyribils. Tey eru grundað á semjuna millum Føroyar, ES og Noreg, sum var galdandi fyri árini 2018-2020.

[2] Eingin svartkjaftur bleiv settur av til vinnuligar royndir og verkætlanir í 2020, men bleiv við lóg settur av sambært vanligu reglunum í § 22, stk. 1 og § 23, stk. 2, sbr. § 15 a í galdandi lóg.

[3] Tað mesta av nøgdini sambært § 14, stk. 1, sbr. § 10, stk. 4 er lagt um til egnar árskvotur, og tískil eru nøgdirnar, sum í 2021 eru eftir at luta út til vinnuligar royndir og verkætlanir ávikavist **1.304 tons av norðhavssild, 1.607 tons av makreli og 2.357 tons av svartkjafti**.

[4] Fyrivarni verður tikið fyri, at tølini fyri øll trý fiskasløgini, ið eru grundað á part av heildarkvotuni sambært § 15, eru fyribils, tí viðurskiftini við ES og Bretland eru enn ikki komin endaliga upp á plass.

[5] Skal setast av til vinnuligar royndir og verkætlanir sambært § 49, stk. 1 í 2021.